# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

**Svarari:** Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

**Evni:** Koronupass

**Spurningar:**

1. Hvussu fer talgilda koppsetingarkvittanin / koronupassið at rigga?
2. Fer talgilda koppsetingarkvittanin / koronupassið at vera grundarlag fyri, hvat borgarar í landinum hava atgongd til í mun til almenn og privat frítíðar- og mentanartilboð, vørur og tænastur annars?
3. Kunnu fólk uttan koppsetingarkvittan / koronupass verða noktaði atgongd til ávís tilboð, vørur ella tænastur?

**Viðmerkingar:**
Danskir myndugleikar hava ment eitt koronupass, sum er eitt skjalprógv fyri, at fólk eru liðugt koppsett ella eru kannaði fyri COVID-19. Koronupassið gevur fólki atgongd til kaffistovur, matstovur og mentanartilboð. Passið skal m.a. nýtast, um mann skal til frisør, uttanlandsferðir ella vitjanir á forngripa-, lista- og bókasøvnum. Heldur mann ikki reglurnar um koronupass, kann mann fáa bót.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at heilsuverkið eisini arbeiðir við eini líknandi skipan, men enn er ikki greitt, hvørjar eginleikar koronupassið fer at hava, og hvørjar prinsippiellar avleiðingar tað fær fyri viðurskiftini millum borgaran og breiðara samfelagið. Tað er ikki nágreinað, um koronupassið eitt nú bert skal brúkast í sambandi við ferðing uttanlands, ella um tað eisini verður grundarlag fyri, hvat virksemi og hvørjar tænastur borgarin hevur atgongd til í samfelagnum. Heldur ikki er greitt, hvørjar avleiðingar tað fær fyri borgarar, ið ikki lata seg koppseta, ella av aðrari orsøk ikki útvega sær koronupass.

**Á Løgtingi, 21. apríl 2021**

Bjarni Kárason Petersen